# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Steinbjørn Jacobsen, Klaksvík:

## Seinasti starvsdagur sum pakkimeistari á Posthúsinum

**Fríggjadagin 28. november var lítil samkoma á Posthúsinum í Klaksvík í sambandi við at Steinbjørn Jacobsen, pakkimeistari, hevði sín seinasta starvsdag eftir at hava arbeitt á stovninum í 37 ár. Hann er 63 ára gamal, nú hann fer frá við eftirløn**



*Steinbjørn Jacobsen, pakkimeistari og Roymer Lamhauge, deildarleiðari hjá Postverki Føroya*
*Mynd: Bárður Lydersen*

Steinbjørn er klaksvíkingur, sonur Emmu, f. Larsen, og Sam Jacobsen, vanliga nevndur Sam í Búðunum.

Sum 14 ára gamal arbeiddi hann á tunnuvirkinum hjá Bjarna Lützen, og sum 17 ára gamal fekk hann starv á Føroya Bjór. Í 1962-63 koyrdi hann hýruvogn og vøruvogn í Klaksvík. Eftir tað fór hann aftur á Føroya Bjór og seinni á heilsøluna hjá Kjølbro.

Í november 1966 fekk hann starv á Posthúsinum í Klaksvík sum postboð. Hann var postboð í 20 ár til 1986, tá hann flutti inn á pakkadeildina og bleiv settur sum pakkimeistari í 1987. Hetta starv hevur hann røkt, til nú hann legði frá sær seinasta fríggjadag.

Steinbjørn er kanska best kendur sum fótbóltsleikari. Hann byrjaði sum 12-13 ára gamal á skúlaliðnum, har teir m.a. plagdu at spæla ímóti fuglfirðingum. Hann var 16 ára gamal, tá hann fyrstu ferð spældi við fyrstu deild hjá KÍ. Annars spældi hann fast á fyrstu deild frá 1958 til 1975. Hann hevur 13 ferðir verið við á føroyameistaraliði, tríggjar ferðir við dreingjaliðinum og nýggju ferðir í fyrstu deild, og einaferð við triðjudeild, tá teir eisini blivu steypavinnarar. Hann var leikandi venjari hjá fyrstu deild frá 1966-71, tey góðu árini hjá KÍ, tá teir blivu føroyameistarar fimm ár á rað. Tá hann gavst í fyrstu deild, spældi hann í aðru og triðju deild. Hann var eisini fimm ferðir við á Landsliðnum og fekk gullnálina. Sum frítíðarítriv hevur Steinbjørn bridgespæl.

Steinbjørn er giftur við Karin Mariu, f. Dahl, úr Klaksvík, tey fingu fýra døtur: Emmu, f. 1962, Jórun, f. 1963, sum doyði fimm ára gomul í 1969, Súsonnu, f. 1965, og Jórun, f. 1980.

Hóast Steinbjørn er farin frá, kemur hann nokk at hjálpa til á Posthúsinum nú til jólar og at avloysa av og á.



*Sigbrand Johansen, posthúsleiðari, Steinbjørn Jacobsen, pakkimeistari, og Roymer Lamhauge, deildarleiðari hjá Postverki Føroya*
*Mynd: Bárður Lydersen*



*Steinbjørn við pakkavektina har hann hevur arbeitt síðan 1986*
*Mynd: Bárður Lydersen*



*Starvsfólkini sum arbeiða inni á posthúsinum í Klaksvík: f.v. Sigbrand Johansen, posthúsleiðari, Fríðgerð Jacobsen, Steinbjørn Jacobsen, Heidi Biskupstø, Åse Ziska og Ruth Hansen. Anni Sørensen vantar á myndini*
*Mynd: Bárður Lydersen*



# CLAIR – PROFILE OF A MONSTER

*Offshore Faroes 2003*
*JEREMY CRESSWELL*

ABOUT this time next year, BP should have the Clair field onstream and sending oil to Sullom Voe terminal in Shetland.

Not only is it a lifeline to Sullom Voe, getting this giant of a field onstream will be the end of a 27-year haul, given that Clair was located west of Shetland in July 1977.

Development has been shelved at least once. But now the project is unstoppable, with construction past the halfway mark and apparently on track.

Clair is a monster in more ways than one. It's not just huge (220sq.km), with reserves estimates ranging from 3billion to more than 4billion barrels of heavy crude, unravelling her geological secrets proved a nightmare. That was not achieved until the late 1990s.

Real contractor engagement did not start until the end of 1999, once it had been decided what would needed … a stripped down, to the point approach without North Sea-style "gold-plating".

The best in class role model selected was Pompano, a BP-operated Gulf of Mexico platform from which a fit-for-purpose derivative suited to Northwest Europe conditions was evolved.

After several false starts and partner friction, Clair was finally ready for sanction in 2001. That came symbolically when, in November that year, Energy Minister Brian Wilson gave it the green light.

Phase-1 concentrates on the core, Graben, and Horst segments in the southern area of the field, with estimated oil in place of approximately 1.75billion barrels of which 287million might be recoverable over a 24-year period.

Depending on how Phase-1 works out, further development is possible, with a recoverables target of 400mmb, though there is informal talk of more than 500mmb.

Clair development is based on a single large, steel jacket platform located in 165m of water, with output based on 15 production wells, eight water injectors, and one drill cuttings re-injection well. First oil is anticipated in Q3 2004, with daily output expected to peak around 60,000 bpd of oil and 15 million cu.ft of gas.

Ramping up oil production will be a gradual process as wells are progressively drilled using the platform's own drilling package. One is being predrilled and will be first onstream.

"Then the (platform's) rig will drill the remaining wells of the Phase-1 development," said project director Terry Hughes.

"We currently have a 25-well programme and, while we could change it, at the same time we've come to the conclusion that we need four or five years of production history under our belt before we have sufficient information to enable us to make sensible decisions on possible changes to the drilling plan.

"It will take six years to drill and put all these wells in place."

Meanwhile, under the original plan, the Clair pipeline was to be laid next year, but the decision was made to install it summer 2003, in case 2004 turns out to be a bad weather year west of Shetland.

Platform fabrication is in the hands of Aker Kværner (jacket) and Amec (topsides). Many small suppliers and sub-contractors also have work and, overall, construction is comfortably past the halfway mark.

Construction is currently at peak, with roughly 1,800 tradespersons and engineers employed in various locations, mostly at Verdal in Norway and Wallsend on Tyne in England.

Load-out will take place next summer, with the expectation at BP that first oil will be achieved before winter sets in.

BP is operator with 28.6% interest. Partners are Conoco (24%), ChevronTexaco (19.4%), Enterprise Oil (18.7%), and Amerada Hess (9.3%). The field covers blocks 206/7a; 206/12; 206/8; 206/13a; and 206/9, but is centred in Block 206/8.

**(Henda greinin skuldi vera við í serblaðnum um oljuvinnu í gjár, men vegna plásstrot kemur hon fyrst nú). Jeremy Cresswell telist millum fremstu oljujournalistarnar í Skotlandi og helt hann fyrilestur á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í gjár).**



*Partur av Clairframleiðslupallinum er við at taka skap. Her dekkið, sum verður gjørt í Tyneside í Skotlandi*
*Mynd Press and Journal*

## Lyft til rørslutarnað á Fornminnissavninum

**RØRSLUTARNAÐ**
*Tíðindaskriv*

Í nógv ár hevur Fornminnissavn havt eitt ynski um at fáa eina lyft millum báðar hæddirnar í framsýningini í Brekkutúni 6 í Hoyvík.

Nú hevur Fornminnissavnið so tað gleði at kunna bjóða bæði rørslutarnaðum og øðrum í framsýningina mikudagin 3. desember kl. 10 at hátíðarhalda løtuna, tá ið lyftin alment verður tikin í nýtslu.

Leila Solmunde fyri MBF sigur nøkur orð um munin á at vera brekaður fyrr og nú og týdningin av atkomu til søvn oa. bæði fyri fólk í Føroyum og fyri ferðavinnuna.



*Johan í Króki (1865 - 1942) Brot úr mynd*

Ein lítil serframsýning við hjálpartólum gjøgnum tíðina er sett upp í sambandi við dagin.

Aftaná verður ein kaffimunnur og ein køkubiti.

Øll eru vælkomin, sigur Føroya Fornminnissavn í tíðindaskrivi.

## Zakarias Wang á grønlendskum

**BÓKAÚTGÁVA**
*Tíðindaskriv*

»Kalaallit Nunaata Savalimmiullu tunngaviusumik inatsisitigut inissisimanerat« eitur bók, sum Zakarias Wang hevur skrivað um ríkisrættarligu støðuna hjá Grønlandi og Føroyum, og sum varð løgd fram í Grønlendingahúsinum í gjár.

Innihaldið í bókini er tann grein, sum stóð í øðrum árgangi av Føroyska Lógar Riti. Í nr. 2 stóð hon har á føroyskum og í nr. 3 á enskum. Moses Olsen hevur týtt innihaldið til grønlendskt, og hevur Kristian Poulsen týtt samandráttin.

Thue Christiansen, maðurin sum hevur teknað tað grønlendska flaggið, hevur gjørt kápumyndina og týtt tekstin á baksíðuni. Bókin fer at vera til sølu í Grønlandi og í Føroyum.

Bókin vísir á, at sambært dómin, sum altjóðadómstólurin í Haag feldi tann 5. apríl 1933, eru Grønland og Føroyar eitt ríki undir somu konstitutión, og eru í unión við Danmark á jøvnum føti. Vit stýra sjálvi ríki okkara. Í løtuni hava vit givið donsku stjórnini heimild at stýra okkum, men nær tað skal vera kunnu vit geva donsku ráðharrunum boð um, at teir einki hava at siga í okkara viðurskiftum.

Tað er forlagið Stiðin sum gevur út. Hon er heft, og síðutalið er 39.